FALDARI 8

# H71

2016 2017

## HEIMA Í HOYVÍK




FTZ DEILDIN

# H71 v VÍF

**HOYVÍKSHØLLIN** SUNNUDAGIN **9. APRÍL** 2017 **KL. 18.00**

Auto Service
BÓNUS er biligari!
J&K
TRYGD
INTERSPORT Thomas Dam ítróttur
ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STRØND 4
LAIDERZ
SUÐUROYAR SPARIKASSI

# FINALUPLÁSSIÐ TRYGGJAÐ

## Í TVEIMUM SERA SANNFØRANDI SIGRUM Í SÍÐSTU VIKU, TRYGGJAÐI H71 SÆR AFTUR Í ÁR, FJÓRÐA ÁRIÐ Á RAÐ, PLÁSS Í FINALUNI Í FREMSTU DEILDINI HJÁ MONNUM Í HONDBÓLTI

Mánakvøldið varð leikt ímóti Kyndli og vunnu vit heili 27 – 16, eftir at hava verið á odda 14 – 10 í hálvleikinum. Sunnukvøldið eftir vunnu vit 9 málum, hesiferð ímóti hinum havnarliðnum Neistanum, nevniliga 27 – 18, eftir hálvleiksstøðuna 10 – 7. Hetta vóru samstundis seinastu dystir okkara í ár ímóti liðunum í Havn og staðfestu vit soleiðis her við árslok støðu okkara sum at kalla einaráðandi í høvuðsstaðnum. Vit hava tveir dystir eftir í landskappingini, fyrst nú hin 9. apríl í móti VÍF í Hoyvík og loksins ímóti KÍF í Kollafirði hin 15. apríl. Síðani eru bert finalurnar eftir og liggja hesar mikudagin hin 19. apríl og leygardagin hin 22. apríl. Skal ein triðja finala til, verður hon leikt sunnudagin hin 23. apríl.

H71 vann sum kunnugt eisini steypafinaluna fyrr í ár og hava vit tí møguleikan fyri, fyri fyrstu ferð í søgu felagsins, at vinna greipuna. Vit høvdu eisini møguleikan í fjør, men taptu tá finalurnar í landskappingini lemjandi fyri einum tá væl betur leikandi VÍF liði. Tað er neyvan nakar ivi í, at hitt finaluliðið í ár, aftur verður VÍF, so vit hava møguleikan fyri at vaska tapini frá í fjør av okkum aftur.

Annars sær leikárið út til at hilnast væl hjá okkum í ár. Í dreingja- og mansdeildunum eru vit á odda í øllum deildum, uttan dreingir 10, har vit eru nr. 2. Møguleiki er soleiðis fyri at vinna 7 av 8 møguligum gullheiðursmerki í dreingja- og mansdeildini í ár. Á gentu- og kvinnusíðini, hevur gingið hampiliga væl aftur í ár. Kvinnurnar í 1 deild (næstfremsta deildin) hava verið suverenar og hava vunnið allar sínar dystir og fáa so sannførandi gull í ár. Eisini vinna vit gull í gentum 14. So samanumtikið kann H71 í ár vinna 9 av 14 møguligum gullheiðursmerkjum – so tað skal ein sanniliga ikki klaga um.

Partilluár er í ár, so hóast landskappingin er farin at halla, so steðgar hondbólturin í Hoyvík ikki. Hildið verður áfram at venja í somu øði, so formurin framvegis kann vera í topp til Partilluluttøkuna í Gøteborg í summar.

Stóri spurningurin fyri H71 at taka støðu til í summar, verður um H71 skal leggja í vaðið og melda lið til í fremstu deildini hjá kvinnum. Fremsta lið okkara í kvinnudeildini hevur staðið seg einastandandi væl og sum sagt vunnið allar sínar dystir. Støðið er tó munandi lægri í næstfremstu kvinnudeildini og fingu vit tað at sanna í steypakappingini, har H71 luttók sum einasta lið úr fyrstu deild og tapti allar dystir sínar stórt. Neyðugt verður tó at fáa lið í fremstu deildini hjá kvinnum, men um rætta løtan er nú, er ilt at siga. Vit hava nógvar javntgóðar leikarar og kunnu neyvan loyva okkum at halda uppá hesar, um vit ikki kunnu bjóða teimum at leika í fremstu deildini. Sum skilst er avgerð ikki tikin í málinum enn, men verður spennandi at vita hvussu leikur fer.



**Anna Dam**
forkvinna,
tel. 519082


**Bergtóra Høgnadóttir**
næstforkv., tel. 286011


**Ann-Mari B. Mouritsen**
tel. 214452


**Emy Sólvitsdóttir**
tel. 513769


**René Dahl Olesen**
tel. 235930


**Janet Fríða Johannesen**
tel. 212211


**Símun Poulsen**
tel. 517220


**Erland Jensen**
tel. 243534


**Hondbóltsfelagið H71**, Hoyvíkshøllin, Postsmoga 1067, FO-188 Hoyvík, www.h71.fo **FALDARI 3 2016-17**

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 541 705

**Ábyrgd av faldara:** Bergtóra Høgnadóttir
**Snið, umbróting og prent:** Føroyaprent




BANK**NORDIK**

# Heildarráðgeving, ið ger mun

Okkara mál er at veita tær ráðgeving, ið kemur allan vegin runt um tíni viðurskifti. Ráðgeving, ið er snikkað til júst tín tørv, soleiðis at tú kanst brúka tíðina til tað, ið hevur týdning fyri teg. Ráðgeving, ið veitir tær eitt gott yvirlit og gevur tær fíggjarligt rásarúm í gerandisdegnum. Við øðrum orðum; ráðgeving, ið gevur meining.

Ynskir tú ta bestu ráðgevingina?

**Bílegg fund á www.banknordik.fo/nordik360**

*Ráðgeving, sum øll skilja*

SENDISTOVAN



# HIN ELEKTRISKI STÓLURIN

## FÍA HOYDAL



### 1. DEILD KVINNUR
(20 ÁR)

**Hvørjum plássi spælur tú á?**
– Vinstra bakki.

**Hvør á liðnum hjá tær er stórsta drama-queenin?**
– Sunniva Vatnsdal.

**Hevur vánaligasta tónleikasmag?**
– Tað sigst at tað eri eg, men eg eri ikki samd.

**Hevur flottastu reyv?**
– Durita Toftum Joensen.

**Er festligast at vera í brúsu saman við?**
– Ása Krossteig Hansen.

**Hvat er tað flottasta málið, ið tú hevur skorað í einum dysti?**
– Álopið er ikki akkurát mín sterkasta síða, so tað eru nokk fleiri ljót enn flott mál.

**Hevur tú nøkur ritualir áðrenn dyst?**
– Nei ikki orduliga, men tað verður altíð farið inn í magn áðrenn dystirnar á bygd.

**Hvat er tín besta hondbóltsuppliving?**
– Tað man vera ein av uttanlandaferðunum eg havi verið á, tá ið eg var yngri.

**Hvør er besti leikari, ið tú hevur spælt ímóti?**
– Har eru for nógvar at velja í millum.

**Hvat fyri skoritriks hevur riggað best hjá tær?**
– Eg gevi ikki míni triks út til ein og hvønn.

**Hevur tú nakra flóvisliga hondbóltssøgu at fortelja?**
– Har eru eftir hondini nakrar at velja í millum, men í fyrsta dystinum í steypakappingini í ár var tað ein løta, har eg var rættuliga forvirrað, og alt bleiv eitt sindur stressað, so eg rann skeivt út á vøllin tvær ferð. Tíbetur legði dómarin bara merki til tað tí einu ferðina, tí annars hevði eg fingið mína 3 útvísing og reytt kort, og tað hevði verið eyka flóvisligt.

**Hvat ger H71 til besta hondbóltsfelag í Føroyum?**
– Tað er sjálvandi samahaldið í felagnum.


XL BYG
TÓRSHAVN
TIMBURHANDIL - BYGGIMARKNAÐUR
og nú eisini
XL BYG
HANDVERKARABÚÐ
Opið
Mán - frí 08.00 - 17.00
Leygard. 09.00 - 13.00


Lundin Financials
Lundin Løn
Microsoft Dynamics
Trygg
fíggjarstýring
nema
SENDISTOVAN


Tað besta omaná
Forkela familjuna. Royn okkara
leskiliga vaniljukrem.
VANILJU
KREM
Nýggj
vøra!
SENDISTOVAN

javni

Hoydalsvegur 40/Loftið
FO-100 Tórshavn
Tel +298 20 80 90
javni@javni.fo
www.javni.fo

Pf. Jógvan Weihe

P/F Jógvan Weihe | Tel: 35 38 97 | Fax: 35 38 98
www.weihe.fo | weihe@weihe.fo

P/F Hjá Fróða

Jónas Broncksgøta 25
Tel 35 09 00
Fax 35 09 01
frodi@hjafroda.fo

Flügger

Kaj Andreasen & Co
Handilin við tí fjølbroytta úrvalinum



TIT HAVA TØRVIN
VIT ERU VEITARIN.
Handilin við tí fjølbroytta úrvalinum.

Atlas Copco Quality

Atlas Copco

fk




LM ELECTRIC - 100 TÓRSHAVN - HOYVÍKSVEGUR 53
TEL 35 12 20 - WWW.LM.FO - LM@LM.FO


Dekk
- Vit selja øll sløg og allar støddir
- Vetrardekk á sportsfelgum
- Vit hava helst besta prísin
- Góð tænasta og góðir prísir
- Bil or not to bil
- sjálvandi frá Bilrøkt!
Ring 35 88 88 og bílegg tíð
Opið gerandisdagar frá 08.00 - 17.00
og leygardagar frá 10.00 - 13.00
bilrokt.fo
Stiðjagøta 3 · FO-100 Tórshavn · Tel: 358880 · Mobil: 235880 · bilrokt@bilrokt.fo · www.bilrokt.fo


LEASA MEG
PRIVAT LEASING FRA REYNI SERVICE
TOYOTA
3
ÁRA SERVICE PAKKI
YARIS HYBRID
YARIS HYBRID
Einans 3.640,- um mánaðin!
TØRVAR IKKI LØÐING
Við Yaris all in ført tú alt við: Tá er eisini trygging, vektgjald og dekk íroknað. Allir prísir eru við mvg. Eitt stovningargjald á 20.000 kr., eitt fast mánaðargjald og nýggjan bil 3. hvørt ár. Og vit taka okkum av øllum viðlíkahaldi. Sí treytir á reyniservice.fo
REYNI SERVICE
Umhvørvisviðurkent ISO 14001 virki

vistir.fo
haraldsen



trygging.fo



# Tryggja **teg** og **tíni kæru**

Tað er týdningarmikið at tryggja teg og tíni kæru, um tú skuldi verið fyri vanlukku ella sjúku.





Ein **vanlukkutrygging** fevnir um flestar vanlukkur, skaðar og óhapp, sum tú kanst koma út fyri. Til dømis dekkar hon ymisk sløg av tannskaðum og øðrum likamsskaðum, men tilburðurin skal vera íkomin í samband við ein vanlukkutilburð.

**Viðgerðartrygging** er góð og er galdandi alt samdøgrið, bæði tá ið tú ert til arbeiðis og tá ið tú hevur frí. Hon fevnir um pínu, sjúku og fylgjur av vanlukkum, sum krevja viðgerð av serlækna. Hon tryggjar tær viðgerð innan 10 dagar, soleiðis at tú sleppur undan bíðilistum.

**Set teg í samband við okkum og hoyr meira um hesar og aðrar tryggingar.**

Betri pensjón

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR





# Ætlar tú at selja tíni hús í Hoyvík ?

## - vit hava keyparar, ið bíða

Niels F[illegible]a 37 | Tórshavn | Tel 348 900 | inni@inni.fo | inni.fo

INNI

H71

KLÆÐINI
2016/17



**Sweat**
Børn: 399-
Vaksin: 449,-

**Jacket**
Børn: 449,-
Vaksin: 499,-

**Pants**
Børn: 399,-
Vaksin: 449,-

H71 INTERSPORT Thomas Dam ítróttur adidas

# TÍÐIN FER TIL HONDBÓLT, KORTINI!

**– TAÐ MAN VERA TÍ, AT AV TEIMUM, SUM VÓRU Í NEVNDINI, HEVÐI EG VERIÐ LONGST, SIGUR ANNA, SPURD HVÍ JÚST HON ER FORKVINNA Í H71. HONDBÓLTURIN FYLLIR NÓGV HEIMA HJÁ ONNU DAM, SUM TÓK VIÐ SUM FORKVINNA Í FELAGNUM, TÁ SUNNEVA Í FJØR TAKKAÐI FYRI SEG. OG VAR HON IKKI FORKVINNA, FÓR TÍÐIN HELST TIL HONDBÓLT, KORTINI**

At forkvinnan í H71 byrjaði sína hondbóltskarrieru í Neistanum, vita neyvan øll. Gott hjá okkum, at hon endaði í Hoyvík, og at tað tí bleiv H71, og ikki Neistin, sum fekk gleði og stóra nyttu av arbeiðssomu og hollu Onnu.

Níggju ára gomul fór Anna í bláu troyggjuna. Men longu sekstan ára gomul meiddi hon sær aðra økslina so illa, at hon spældi ikki hondbólt í fleiri ár, til hon eftir lokið studentsprógv varð løgd undir skurð. Tá hon so fór til Danmarkar at lesa, spældi hon við ÍF Føroyum.

– Mestsum „hygge-hondbólt", minnist Anna.

## HONDBÓLTSFAMILJA BURTURAV

Í heiminum hjá Onnu og Gunnari Millum Gilja fyllir hondbólturin nógv: Øll trý børnini spæla ella hava spælt hondbólt. Elsta dóttirin, Sólvá, var góður hondbóltsspælari, og kom eisini á ungdómslandsliðið. Hon leyp tó á bláman seinni og gavst við hondbóltinum, tá hon valdi at satsa uppá svimjing ístaðin.

Brøðurnir báðir tóku tíbetur við: Fjúrtan ára gamli og dugnaligi Janus, spælir við bæði D14 og D16.

Og 20 ára gamli Jónas er jú ein av lyklaspælarunum á besta liðnum hjá H71.

Systkini hava gott í at bregða, tí í báðum ættum eru góð ítróttarfólk.

Og stuðulin er eisini dyggur í báðum familjum, tí ommur og abbi, gubbar og onnur eru millum trúgvastu áskoðararnar, tá dystir eru.



*Anna eina hugnaløtu*

## FORKVINNA Í EINUM VINNARAFELAG

Limatalið í H71 er vaksið støðugt og skjótt hesi seinastu árini, og leikarar felagsins – smáir og stórir – hava drigið nógv heiðursmerki til Hoyvíkar.

Hvat er tað so, sum ger H71 til landsins besta hondbóltsfelag?

***...framhald á síðu 16***

AnniJanni

FOKUS 18:29




## Ger tínar dreymar til veruleika

- sama um tú vilt fara undir útbúgving, ert sjómaður ella vilt spara saman til eini hús.

Fokus pakkin hevur alt tað tú hevur tørv á - NemKontu, FokusLán, FokusKreditt, Gjaldskort, Netbanka og FramtíðarKontu. Sum Fokus kundi fært tú ókeypis tænastur, lagaliga fígging og góða rentu.

**Gjaldskort** **Netbanka** **Fígging** **FramtíðarKonta**

Vitja deildina í Vági og Havn.

ss.fo

SUÐUROYAR SPARIKASSI

Orsøkirnar eru sjálvandi fleiri, sigur forkvinnan. Til dømis hava tey megnað at fáa eldru leikararnar at taka ábyrgd av at venja tey yngru. At øll hava ovmikið at gera í gerandisdegnum, tað vita vit. Men í H71 er tað ein mentan, at øll taka ábyrgd, sigur Anna:

– Menninir á besta liðnum vita til dømis, at teir í ávísan mun verða bornir á lógvum, og júst tí skulu teir sjálvandi eisini geva felagnum og felagsskapinum eitt sindur aftur. Um talan er um at venja liðini í yngru deildunum, rudda felagshølini, standa vaktir til 80'ara dans, ella leiða tey smáu og ansa eftir teimum í skrúðgonguni á ólavsøku, so taka øll ábyrgd, fegnast forkvinnan um. Vaksnu leikararnir eru jú fyrimyndir hjá teimum yngru, og júst tí hevur tað so sera stóran týdning, at teir taka hesa ábyrgd í álvara.

Harafturat nevnir Anna ta serligu, fysisku venjingina, sum felagið hevur lagt stóran dent á seinastu árini. H71 hevur sett bæði fimleikavenjara og styrkivenjara, so longu frá 12-14 ára aldri er talan um skipaða styrkivenjing. Hetta er týdningarmikið, metir forkvinnan, bæði tí at hondbóltur er so fysiskt spæl, men hetta fyribyrgir eisini skaðum, og tað hevur stóran týdning:




*Tveir smáir H71'arar*



*Jónas, Janus og eldri ommusonur Onnu, Elias*

– Tað nyttar lítið at brúka nógv á uppá ein hondbóltsleikara, um hann noyðist at gevast ov tíðliga orsakað av skaðum!

## HJÚKLAR UM

Øll vit, sum kenna Onnu vita, at eingin dugir betur, enn júst hon at hjúkla um síni medmenniskju. Og hetta njóta menninir á besta liðnum eisini. Teir hava onkursvegna klárað at sannføra Onnu um, at teir spæla altso betur, tá teir verða forkelaðir við góðum mati undan dysti.

Og hetta tekur forkvinnan í størsta álvara, tí tá dystur í bestu deildini er á skránni, fer stórur partur av degnum hjá Onnu, sum annars skuldi havt ovmikið um oyruni, við at stákast: Fyrst til handils at keypa hønsnarungar, pasta og annað, sum er mikil holdagrøði fyri raskar menn. Síðani at kokkast og borðreiða fyri garpunum, sum tíbetur aloftast takka fyri við at vinna dystin.

*...framhald á síðu 25*

# Frítíðin byrjar umborð




Lætt og ómakaleyst ber til at koyra bæði Danmark, Ísland og alt Evropa upp og niður, júst tá passar tær. Við egnum bili er alt nógv lættari. Pakka viðførið í bilin, koyr umborð og njót ferðina.

Tá tú ferðast við Norrönu, kanst tú byrja at halda frí, leingi áðrenn tú kemur fram til títt frítíðarstað ella summarhús. Umborð á Norrönu kanst tú halda frí, so tað stendur eftirí.

Les meira á **www.smyrilline.fo**, skriva til **booking@smyrilline.fo** ella ring **345900**



Vit hava deilt vinningin millum
allar kundar okkara í 50 ár
– og tí halda vit fram við

Kopargøta 1, Tórshavn | www.liv.fo

Grannskoðan // Ráðgeving // Bókhald // Roknskapur

Skalt tú meta
um framtíðina
mást tú
kenna fortíðina

SENDISTOVAN

WWW.JANUAR.FO

Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI




# Góðir starvsfelagar skapa góð úrslit

"Eg eri vísur í, at tað er góði starvsandin, sum skapar góðu úrslitini hjá Marine Harvest"

*Fjalar, alari í Oyndarfirði*

Marine Harvest strembar eftir at skapa bestu liviumstøður fyri laksin. Vit tryggja okkum, at laksurin er heilsugóður matur. Vit arbeiða í góðum samljóði við umhvørvið og við ábyrgd fyri samfelagnum. Marine Harvest vil vísa vegin til alsamt størri burðardygd.

LAIDERZ

*Better in the long run*







# VIT GERA ALT BLIKK- OG RØRARBEIÐI

Alt til *HITA SANITET & VENTILATIÓN*

**Maria Poulsen & Co**

Smyrilsvegur 8 Postboks 182 FR-100 Tórshavn Tlf. 312000








...bert hugflogið
setur mørk!

OKKARA NÝGGJA SKERIMASKINA

# HUGSA STÓRT

Við nýggju skerimaskinu okkara kunnu vit nú bjóða hesa slóðbrótandi framleiðslu í Føroyum.
Útskorin skelti, stavir, samansetingar og standarar úr flest øllum tilfari og tjúgdum.

**Ja, nú ber veruliga ALT til – Hugsa stórt, hugsa Føroyaprent!**

Ring tel. 314555 og hoyr nærri
www.foroyaprent.fo

Føroyaprent

www.torshavn.fo



Skapandi, mennandi, kveikjandi

TÓRSHAVNAR
KOMMUNA




Ung í Eik
www.eik.fo/ung
Tel. 348000

Eik

## HØGGUSLOKKURIN

Okkara Anna er ikki bara ein vanlig forkvinna. Hon hevur rættiliga nógv størri orku, enn vanlig fólk, og fær so nógv burturúr, at flestu okkara møðast bert av at hugsa um alt tað, hon fær av skafti.

Og vit kunnu bert taka undir við einari aðrari, raskari kvinnu, sum situr í nevndini hjá H71 saman við Onnu:

*„At arbeiða saman við Onnu er framúr. Hugsi mangan, at hennara samdøgur MÁ hava minst dupult so nógvar tímar, sum hjá øllum øðrum. Tí alt sum hon far avrikað umvegis teldupost, fundarvirksemi, alskyns prát – leikarar, foreldur, venjarar, sponsorar, tiltøk, Partille og annað mangt... eg haldi meg ikki kenna nakran sum hana í so máta.*

*So hevur hon eisini ein so ógemeina dámligan og fryntligan verumáta. Brosandi og blíð, men aftrar seg á ongan hátt við at siga frá og siga, tað sum sigast skal á rætta stað um tað er neyðugt. Haldi, vit eru mong sum kunnu læra av hesi dygd. Og júst tað ger, at eg altíð havi eina kenslu og fatan av, at eg veit púrasta, hvar eg havi hana. Kenni meg altíð trygga við hana.*

*Einaferð skuldi ein uppgáva loysast, og vit skuldu hava ein ávísan persón at hjálpa okkum: Eg ringdi fyrst og fekk blankt nei, løtu seinni ringdi annað og tá var tað eingin trupulleiki. Soleiðis ER Anna bara....hon er so dámlig, at ein kann ikki hava annað enn hug til at arbeiða saman við henni. Og eg haldi eisini, at ein lærir nógv við hennara lið.*

*Sum ein av fyriskiparunum til 80-ini umaftur, eri eg eisini takksom fyri, at Anna trúði upp á konseptið, tá vit løgdu tað fram fyri hana og nevndina, tí í veruleikanum kravdi tað eisini, at felagið tordi at vera heldur vágafýst. Tí, um vit ikki seldu nóg mikið av atgongumerkjum kundi undirskotið verið stórt av tiltakinum.*

*Um eg skal taka eitt afturat burtur úr dygdunum og øllum tí dámliga við Onnu, so er tað látur hennara. kenni ongan við so perlandi og smittandi látri sum hon. So samanumtikið kann eg siga at tað er SAKIN at arbeiða í nevnd saman við Onnu."*



***Errin konfirmantur millum foreldrini***

Og samanumtikið kunnu vit so bara, púra samd, staðfesta, at tað er SAKIN at hava eina forkvinnu, sum Onnu!

# SO ER VIT Í FINALUNI!

**SETNINGURIN VAR GREIÐUR ÁÐRENN DYSTIN MÓTI NEISTANUM Í KVØLD. VUNNU H71, SO TRYGGJAÐU TEIR SÆR ANNAÐ PLÁSSIÐ Í FM FINALUNUM. TAPTU TEIR, SO SKULDU TEIR LEITA SÆR TVEY STIG ÍMÓTI VÍF ELLA KÍF NÆSTU DYSTIRNAR**

Neistin hevði háðingarrættin, eftir at teir vunnu í Hoyvík fyri tveimum vikum síðani. H71-leikararnir kundu tí hugsast at hava ein ávísan hevndarhug til dystin.

Tað var fermingarsunnudagur í kvøld, so væntast kundi, at fólk ikki høvdu stundir at fara í høllina í kvøld.

Kortini sást fitt av fólki á áskoðaraplássinum. Størri parturin vóru viðhaldsfólk hjá H71, ið helst vóru komin at stuðla undir, at liðið skuldi vinna sær finaluplássið longu í kvøld.

Tað ætlaðu leikararnir sær eisini. Hetta sóu vit serliga í verjustøðu, har H71 vardi í einari áræsnari verju, ið skifti millum at liggja flatt og at fara út í mótstøðuleikararnar. Hetta riggaði framúr væl, tí Neistin hevði stórar trupulleikar av at spæla seg til møguleikar. Og tá ið teir hendingaferð komu til skot, so stóð Jens oftast fyri.

At hugburðurin var góður hjá H71 sást eftir seks minuttum. Dánjal slapp ígjøgnum í álopinum og skoraði, men varð fangaður á Neistahálvuni, tá spælið varð sett í gongd aftur. Hann speladi aftur á vongin hjá sær, og megnaði at fanga bóltin í fullari ferð, soleiðis at H71 kundi fara aftur í álop.

Eftir átta minuttum mátti Neistin taka time-out. Tá var støðan 1-6 til H71, og meginparturin av málunum vóru skotin eftir skjótálop. Enn eitt tekin um at verjan og málverjin stóðu væl. Pætur vísti hesa fyrstu løtuna sín kvikleika í snarálopunum, eins og hann skoraði góð mál frá vonginum.

*...framhald á síðu 28*


HANDLA
Ein heimur fyri seg av
tilfari til skapandi sálir
01
GLOSSY
www.handla.fo




Eftir time-outið hjá Neistanum sást enn ein greið yvirvág hjá H71 í verjuni. Neistin sóu tó ein møguleika at fáa sær nøkur mál, tá ið H71 fekk ein mann útvístan. Teir valdu at seta sjey mans í álopið, so at teir vóru tveir fleiri. Men sum so ofta áður, so vísti H71, at hetta er ikki altíð ein fyrimunur, tí verjan fangaði bóltin, og Dánjal setti hann í eitt tómt neistamál. Síðani valdi Neistin at seta málverjan innaftur.

Eftir 14 minuttir var støðan 3-8, og samstundis sum vit kundu fegnast um góðu verjuna, so sást eisini í hinum endanum, at Nicholas í neistamálinum byrjaði at fáa fatur á nógvum.

Hetta hevði við sær, at einir 9 minuttir gingu, har einki mál yvirhøvur kom í dystinum. Neistin vóru fyrstir at skora, men Hilmar Leon fekk sett hol á Nicholas í álopinum aftaná.

Tað lá eitt sindur betri fyri hjá Neistanum tað, ið eftir var av hálvleikinum, og teir fingu minkað munin niður í 7-10.

Ein løgin hálvleikur, har H71 kundi iðra seg um at ikki seta nógv fleiri mál millum seg og Neistan. Men samstundis kundu vit fegnast um, at verjan fekk forðað Neistanum í at skora fleiri mál.

Iðraðu H71 seg í steðginum, so gjørdi teir tað í enn størri mun eftir fýra minuttir av seinna hálvleiki.

Hesa løtuna fingu Neistin nevnliga minkað um munin niður eitt mál. 10-11.

Men so hendi nakað gleðiligt. Áskoðararnir fóru veruliga at hoyrast í høllini til tess at stuðla leikarunum í hesi truplu støðuni.

Tað er einki at siga til at áskoðararnir eru vorðnir eitt sindur kræsnir eftir mongu sigrarnar seinastu árini. Men tað er júst, tá ið støðurnar eru truplar, at stuðulin hevur mestan týdning. Herrópini frá viðhaldsfólkunum tóktust eisini at geva leikarunum betri hugburð, tí nú kom hol á málskjótingina aftur.

Andor lobbaði til 10-12, áðrenn Peter eisini vildi vera við og fekk bart seg ígjøgnum so at støðan var 11-13. Nøkur sekund seinni vísti hann aftur, at hann var tendraður, tá hann mátti av vøllinum í tveir minuttir eftir at hava gjørt ov nógv av í verjuni.

***...framhald á síðu 37***

# TÁ RÆTT SKAL VERA RÆTT





ADVOKATSKRIVSTOVAN

Halgir Winther Poulsen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Eyðbjørn Larsen, adv.

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6 · FO-110 TÓRSHAVN
TELEFON: (298) 35 33 35 · TELEFAX: (298) 35 33 36 · WWW.JURA.FO

SENDISTOVAN



Bilasolan.fo
Nýggi Audi A3 Sportback
Langt á odda.
Audi
Vorsprung durch Technik
Bilasølan
Vegurin langi, 359700




Altíð okkurt
sunt og gott
www.fast.fo
fast:


SEX
KREVUR
SAMTYKKI!


SKORA
VIÐ SISU
SISU
Föroya Bjór


NORÐOYA SPARIKASSI
Orkulán 2,5%
- Bústaðarlán við lágari rentu
Bílegg eitt
kundaprát
og fá meira at vita
um fyrimunirnar
við orkuláninum
Norðoya Sparikassi - Hoyvíksvegur 67 - FO-100 Tórshavn Tel. 47 5000 - ns@ns.fo - www.ns.fo

Gullpakkin við keypi av nýggjum bili

# Hesin er við í prísinum í trý ár..!

**Tá tú keypir nýggjan bil frá Auto Service, fylgir Gullpakkin við, sum ger at tú sleppur undan at hugsa um útreiðslur til viðlíkahald og eftirlit av bilinum næstu trý árini.**



*Heðin Weihe,*
*verkstaðsleiðari*



Visti tú av, at tú eigur, sambært framleiðaranum av bilinum, í minsta lagi einaferð um árið til eftirlit við bilinum fyri at varveita garantiið ?

Somuleiðis mást tú skifta olju í mun til, hvussu nógv tú koyrir, perur fara, sprinklaraveska skal fyllast á so hvørt, og so alt annað, so sum bremsur, útstoyt og stoytdoyvarar kunnu fara.

Alt hetta kann gerast til heilt fitt av peningi. Men við Gullpakkanum, sum fylgir við, fært tú alt hetta fyri einki..! Ja, í veruleikanum fært tú ein mekanikara við eykalutum í 3 ár ella til tú hevur koyrt 90.000 km, við í prísinum, tá tú keypir nýggjan bil frá okkum.

Vælkomin til eitt gott bilakeyp.



**Í Gullpakkanum fært tú:**

- Eftirliti og viðlíkahald av bilinum og harafturat allar neyðugar umvælingar
- Arbeiðsløn, eykalutir sum t.d. perur, viskarabløð og neyðugar veskur og viðlíkahalds- og umvælingararbeiði.
- Tað vil siga: **Ongar viðlíkahalds-útreiðslur komandi trý árini!**

Sí treytir á www.autoservice.fo

Undir Krákugjógv 19 - Postboks 3168 - 100 Tórshavn - Tel 34 54 00 - as@autoserice.fo

**Auto Service**
www.autoservice.fo

# SPEKT kann hjálpa tær við

Bókhaldinum

Roknskapinum

Lønarumsitingini

Sjálvuppgávuni

Kapitalvinnings-
sjálvuppgávuni

Rentustuðlinum

Útlendskum
skatti

Afturrindan
av mvg

Eftirlønum

SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. ·Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn ·Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo

SPEKT løggildir grannskoðarar

FAROE SHIP

BYGMA
BALSLEV

Stuðlar ítróttini

samskip
Saman røkka vit málinum

yviri við Strond 23 – Postbox 3255 – Tel. 30 88 00 – Fax. 30 88 01 – www.samskip.com



Neistin hevði einki lært í fyrra hálvleiki og setti ein eyka mann í álopið. Hetta hevði við sær, at Ári – ið stóð meginpartin av seinna hálvleiki – kundi senda enn ein bólt í tóma neistamálið til 11-14.

Nú tóktist aftur tamarhald at vera á dystinum, og H71 fór at skifta eitt sindur út. Millum annað sóu vit Poul Símun á strikuni, og bæði leikarar og áskoðarar frøddust, tá ið hann fekk sett bóltin í málið eftir at níggju minuttir vóru farnir av seinna halvleiki.

Eisini sóu vit Niklas koma inn á miðjuna, og eisini hann fekk frøi í fjøldina, tá ið hann skoraði til 16-26 ímóti endanum av dystinum.

Seinastu 15 minuttirnar var fult tamarhald á dystinum. Neistin hevði stórar trupulleikar við at skjóta mál, og samstundis vóru skjótálopini hjá H71 eisini farin at rigga. Gleðiligt var at síggja, at hóast útskiftingar, so stóð verjan væl restina av dystinum. Seinastu løtuna vardu Poul Símun og Niklas saman í miðverjuni, og tað eydnaðist teimum væl.

Hans Kári fekk skorað seinasta málið hjá H71, tá hann eisini fekk sent ein bólt í tóma neistamálið.

Dysturin endaði við sigri á 18-27, og seinasta minuttin hoyrdust lógvabrestir í høllini fyri at fagna enn einum góðum verjuavriki, og týdningarmest av øllum: H71 tryggjaði sær finaluplássið.

Skulu vit hyggja frameftir, so eru nú tveir dystir, ið skulu spælast í grundspælinum, áðrenn finalurnar. Teir eru móti VÍF og KÍF, og teir eru ikki týdningarleysir, tí tað er eingin ivi um, at fyrsta plássið í kappingini er ein fyrimunur.

Venjararnir hava eisini nakrar støður, ið nú skulu takast. Har skal vera ein javnvág í, hvussu og hvørjir leikarar skulu sparast, samstundis sum allir leikarar helst skulu vera heitir til finalurnar. Tað er eingin ivi um, at breiddin verður avgerandi í finalunum.

Eisini er tað vist, at venjararnir meta, at skipaða álopið kann gerast betri. Seinastu tveir dystirnar hava verjan og málverjarnir staðið framúr væl, men álopið hevur ikki verið lýtaleyst.

Mest umráðandi er kanska, at liðið ikki fær skaðar. Í hesum sambandi kunnu vit fegnast um at Bogi spældi í dag – og at hann spældi væl. Nú er tað bert Helgi, ið framvegis ikki fær verið við. Hann hevur júst verið skurðviðgjørdur í knænum, har helvtin av meniskinum er tikin. Læknarnir siga tíverri, at hann helst ikki sleppur at spæla finalurnar.

## H71

1 Ári E. **Dam**
16 Jens **á Skipagøtu**

3 Hjalte **Bachmann**
4 Rúni **Vest Højgaard**
5 Bogi **Gaard Davidsen**
8 Pætur **Thomsen**
10 Vilhelm **Poulsen**
11 Hans Kári **Hansen**
14 Sigmundur **H. Dahl**
15 Sigmundur **Nolsøe**
18 Andor **Sivertsen**
22 Helgi **Hoydal**
23 Hilmar Leon **Jakobsen**
24 Niklas **Højgaard Hanusarson**
45 Peter **Krogh**
73 Dánjal **Tórgarð**
89 Jónas **G. Djurhuus**
99 Tróndur **Arge**

**Venjari:** Sonni D. V. Larsen
**Hjálparvenjari:** Mark Lausen-Marcher
**Málmansvenjari:** Jens á Skipagøtu
**Styrkivenjari:** Heri Ziska
**Liðleiðari:** Petur Sivertsen
**Fysioterapeutur:** Bartal Dahl Andreassen

## VÍF

12 Uni **H. Petersen**
16 Mladen **Mjerimacka**

2 Sámal **Joensen**
3 John **R. Nielsen**
4 Magnus **Múller**
5 Agnar **Joensen**
6 Rúni **Joensen**
7 Hanus **Christoffersen**
8 Julian **Olsen**
9 Áki **Egilsnes**
10 Andrias **Eriksen**
14 Bjarti **Hansen**
19 Sjúrður **Olsen**
20 Rói **Lamhauge**
21 Filip **Jojic**

**Venjari:** Ingi Olsen
**Á bonkinum:** Hjalmar K. Olsen, Jóngerð Nielsen og Jákup Durhuus

## Dystaryvirlit hjá H71 í FTZ-deildini:

| | | |
|---|---|---|
| 18.09.2016 | **H71** - Team Klaksvík | **36**-19 |
| 21.09.2016 | StÍF - **H71** | 23-**36** |
| 25.09.2016 | **H71** - Kyndil | **26**-19 |
| 06.10.2016 | Neistin - **H71** | 26-**23** |
| 08.10.2016 | KÍF - **H71** | 29-**23** |
| 16.10.2016 | **H71** - VÍF | **28**-17 |
| 23.10.2016 | Kyndil - H71 | 21-**29** |
| 26.10.2016 | Team Klaksvík - **H71** | 22-**29** |
| 30.10.2016 | **H71** - StÍF | **25**-25 |
| 09.11.2016 | **H71** - KÍF | **23**-22 |
| 13.11.2016 | **H71** - Neistin | **22**-20 |
| 27.11.2016 | **H71** - Kyndil | **24**-23 |
| 11.12.2016 | VÍF - **H71** | 27-**29** |
| 14.12.2016 | **H71** - Team Klaksvík | **35**-16 |
| 17.12.2016 | StÍF - **H71** | 21-**24** |
| 26.02.2017 | **H71** - KÍF | **23**-25 |
| 01.03.2017 | VÍF - **H71** | 23-**27** |
| 08.03.2017 | Team Klaksvík - **H71** | 19-**29** |
| 12.03.2017 | **H71** - StÍF | **28**-30 |
| 19.03.2017 | **H71** - Neistin | **30**-31 |
| 25.03.2017 | Kyndil - **H71** | 16-**27** |
| 01.04.2017 | Neistin - **H71** | 18-**27** |
| 09.04.2017 | **H71** - VÍF | - |
| 15.04.2017 | KÍF - **H71** | - |

## Støðan í FTZ-deildini:

| Nr. | Lið | Dystir | V.M | T.M | Munur | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **1** | **H71** | **22** | **603** | **492** | **111** | **33** |
| 2 | VÍF | 22 | 670 | 552 | 118 | 31 |
| 3 | Kyndil | 23 | 600 | 566 | 34 | 28 |
| 4 | KÍF | 22 | 553 | 527 | 26 | 27 |
| 5 | Neistin | 22 | 543 | 575 | -32 | 20 |
| 6 | StÍF | 23 | 622 | 649 | -27 | 16 |
| 7 | Team Klaksvík | 22 | 466 | 696 | -230 | 1 |

## ÆTLAR TÚ AT STOYPA?

Tosa fyrst við okkum.

Framkomna, teldustýrda betong-blandiskipanin syrgir fyri, at tú kanst vera heilt vísur í, at tú fært betong av allarbestu góðsku bæði til nýtslu á landi og undir vatni
Blandi- og pumpubilar okkara bera so í bandi, at útkoyring og fylling í formar v.m. ikki er nakar trupulleiki - heldur ikki um tvørligt er at sleppa framat.

Vit koyra um alt landið og eru kappingarførir í prísi!



J & K Betong

á Hjalla | Postboks 3179 | FO-110 Tórshavn | tel 31 50 60 | fax 31 41 94 | e-mail: jkp@jkp.fo | www.jkp.fo
Blandimeistarin tel 58 50 25

»GOTT ER AT HAVA
GÓÐAN Í RÁÐUM«



ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4

YVIRI VIÐ STROND 4 · TEL 203040 · FAX 203041 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
LAWFIRM@LAWFIRM.FO
WWW.LAWFIRM.FO

JÓGVAN PÁLL LASSEN · PETUR EVEN DJURHUUS
JÓGVAN E. ELLEFSEN · ANNA DAM · INGI HØJGAARD
GUNN ELLEFSEN · JULIANNA KLETT